VIÐMERKINGAR

# Israels besættelse af Palæstina

**Leif Jacobsen**

Når fremtidige generationer spørger os om, hvordan vi kunne støtte Israels brutale og ulovlige besættelse af Palæstina, hvad vil vi så svare? Det spørgsmål falder mig ind, når jeg dagligt ser den palæstinensisk-israelske konflikt true med at komme fuldstændigt ud af kontrol, med Israels almægtige væbnede styrker, som truer med et omfattende angreb på deres i det store og hele ubevæbnede modstander.

Vore efterkommere vil undre sig over hvilke argumenter der overbeviste støtterne af en besættelsesmagt, som tydeligt overtræder bestemmelserne i Genevekonventionen (regler indført efter anden verdenskrig for at forhindre en gentagelse af Nazi-krigens forbrydelser), en række FN-resolutioner og alle andre normer for international lov. Hvordan vil vi forklare vores samarbejde med et sådan bøllestat?

Vores sorg bliver stor af den ironi, at staten Israel - i høj grad er grundlagt som kompensation for verdens fiasko med at beskytte jøderne mod folkemord - så skamløst lader hånt om normerne for menneskerettigheder fremkaldt af væmmelse ved Holocaust.

Siden 1976 har Israel været den største modtager af hjælp fra USA, ifølge tal fra kongressen. Amerikanerne ser på i stum samtykke, at deres allierede myrder potentielle »angribere«, bruger USA-fremstillede krigsfly og andre sofistikerede våben til at angribe ubevæbnede protesterende, beslaglægger palæstinensisk ejendom og nedriver deres hjem, for at bygge yderligere jødiske bosættelser forbundet med hovedveje »kun for jøder« og tildeler sig selv vandforsyningen, der er adskillige gange større end den mængde, man tillader de oprindelige palæstinensere. Dette er blot nogle af de overgreb, som er dokumenteret af menneskerettighedsgrupper og andre observatører.

Den amerikanske advokatforening, som besøgte Israel og de besatte områder tidligere i år udfærdigede en rapport. »Resultatet af Israels vilkårlige brug af dødbringende magt bevidnet af delegationen efterlader ingen tvivl om, at Israel er i gang med alvorlige menneskerettighedsovertrædelser,« konkluderer 2001-rapporten. »Fortsat bistand fra USA har gjort Israel mere skamløse i deres brutale behandling af den civile palæstinensiske befolkning.«

Israel bliver ikke gjort ansvarlig for disse overgreb på grund af USA's beskyttelse. Dette land har brugt sin vetoret til at stoppe dusinvis af FN-resolutioner, som fordømmer Israel. Det sidste tilfælde omfattede USA's veto af en sikkerhedsrådsbeslutning om at indsætte internationale observatører i regionen, som kontrollanter og fredsskabere.

Frustreret af deres magtesløshed og sårbarhed, har nogle palæstinensere valgt at blive selvmordsbombere, som en måde at slå tilbage på. Og faktisk er en sådan taktik, et af de eneste effektive våben, et ubevæbnet besat folk har mod en veludstyret og skrupelløs besætter. Denne terroristiske taktik er klart afskyelig, men er ikke mere umoralsk end de israelske højteknologiske våben, som også dræber uskyldige civile.

Premierminister Ariel Sharon har brugt tid på disse isolerede tilfælde — og uroen i forbindelse med den såkaldte Al Aqsa intifada — til at retfærdiggøre sin aggressive militarisme. Sharons 6 måneder gamle administration har jævnet snesevis af hjem med jorden og besat Orient House, det uofficielle sæde for de palæstinensiske myndigheder i Jerusalem; han har også forøget tempoet for likvideringerne, som Israel kalder »dødelig forebyggende selvforsvar,« selv om alle menneskerettighedsgrupper og de fleste lande (også USA) kraftigt har fordømt metoden.

Hvordan vil fremtidens betragte de skribenter, som rutinemæssigt bagvasker de palæstinensiske ledere, eller enhver arabisk nation som protesterer mod Israels ulovlige besættelse, i det mest nedsættende tænkelige sprog? I denne formodede oplyste tid forsøger disse kommentatorer i det mindste ikke at maskere deres anti-arabiske fordomme?

Nogle henter inspiration fra middelalderen og foreslår at bygge en uigennemtrængelig mur omkring Israel, formodentligt for at udelukke eventuelle selvmordsbombere. Selv apartheidstyret i Sydafrika (som Israel mere og mere ligner) tog aldrig den ide op om at adskille racerne med mure.

Hvorfor ignorerer vi israelske overgreb? Vi gør det delvis på grund af skyld over vores inaktivitet under Nazi-folkemordet. Nogle synes endog villige til at give Israel en slags moralsk pas, fordi jødisk historie har været så hårdt plaget af anti- semitisme. Desuden anser vesten Israel for en væsentlig allieret i en omskiftelig olierig region og får derfor betingelsesløs støtte af geopolitisk grunde.

Hvor gode disse grunde kan synes i dag, så vil de næppe overbevise vore efterkommere om at vi gjorde det rigtige.

# Strok & Snirr afturkomið

**Barna- og ungdómsblaðið Strok & Snirr er aftur í skúlunum og í leysasølu**

MENTAN

Innihaldið í fyrsta Stroki & Snirri eftir summarsteðgin er sera fjølbroytt. Í hvørjum Stroki eru nakrar síður um okkurt serligt evni, har prátað verður við fakfólk og ung. Hesuferð snýr tað seg um tenn og tannrøkt. Tíðindafróði sigur tíðindi úr øllum heraðshornum, og afturvendandi eru forvitnisligar frásagnir úr søguni, Blits - súrt og søtt um tey kendu, uppgávusíður, gaman, teknisøgur, krossorðagáta o.m.a.

Í Snirri sigur Tíðindafróði tíðindi, Gløggi Blobb greiðir frá ymiskum vísindaligum, hesuferð um kúlupennin, har eru søgur, teknisøgur, úr bíbliusøguni, fleiri uppgávusíður o.m.a. Í fleiri førum ber til at senda loysnir inn og sostatt vera við í lutakasti um at vinna fløgur, ymiskar bøkur o.a.

Aftur í ár verður skipað fyri haldarakapping við stórum vinningi. Hesuferð er tað ein foto-myndakapping, og høvuðsvinningurin eri eitt digitalt Olympus Camedia C-you myndatól á jólum, og aftur komandi summar. Umframt hesar vinningar eru fløga og einnýtis-myndatól at vinna í hvørjum blaði.

Nú eru trý ár síðan, at 47 ára gamla Barnablaðið varð hamskift: Blaðstjórnin setti sær fyri at gera blaðið meiri nútíðarhóskandi, og fyrsta kravið var tá, at tað skuldi vera í litum, alt sum tað var. Síðan skuldi tað býtast sundur soleiðis, at tað skilliga vendi sær bæði til teir yngru og eldru børnini. Hetta varð gjørt við at gera blaðið sum tvey bløð í einum við hvør sínum heiti: Snirr til tey yngru, og Strok til tey eldru. Byrjar tú úr øðrum endanum, eitur blaðið t.d. Strok, men tá ið tú ert komin á opnuna í miðjuni, mást tú venda blaðnum á høvdið, og byrjar tú aftur fremst, er blaðið Snirr. Á opnuni í miðjuni er ynskimyndin, sum øll kunnu ynskja sær. Í fyrsta blaðnum hesuferð er mynd av Snabba Snabbason, sum Jóannes Lamhauge teknar, og í tí næsta blaðnum verður tað sangbólkurin Limp Bizkit. Hesar myndir hava lesararnir sjálvir valt. Blaðið verður nú prentað á glittað pappír, so litirnir koma rættiliga til sín rætt.

Blaðið kemur út 8 ferðir í skúlaárinum, tað er 40 bls. í litum. Tey flestu tekna seg sum haldarar í skúlunum, og tá er haldaragjaldið kr. 120 fyri alt skúlaárið. Tað ber eisini til at fáa blaðið sendandi við postinum.

Í blaðstjórnini eru Niels Jákup Thomsen, blaðstj., Beinta Johannessen, Jonna Olsen og Eyðna Magnussen.






# Landsstýrismálanevnin roknar við løgmanni

**Landsstýrismálanevndin hevur eingi stig tikið til at leggja upp í málið um skúlatrætuna á Trøllanesi, hóast ivi er sáddur um heimildirnar fyri avgerðini hjá landsstýrismanninum**

Politikkur
Eyðun Klakstein



*– Løgmaður hevur sum sín fremstu uppgávu at syrgja fyri, at landsstýrismenninir sita fyri sínum málsøkjum á fullgóðan og lógligan hátt, og tí rokna vit við, at hann fær skil á málinum, sigur Edmund Joensen, formaður í landsstýrismálanevndini*

Landsstýrismálanevndin hevur eingi stig tikið til at leggja upp í málið um skúlatrætuna á Trøllanesi.

Mentamálastýrið er komið illa fyri, tí stýrið hevði onga heimild fyri tí avgerð, sum varð tikin um skúlan á Trøllanesi, og seinni er eitt týðandi skjal í málinum ikki útflyggjað fjølmiðlunum, sum bóðu um innlit.

Edmund Joensen, formaður í Landsstýrismálanevndini, sigur, at nevndin fylgir málinum, men enn ikki hevur tosað um at fara at kanna gongdina í málinum.

– Løgmaður hevur sum sín fremstu uppgávu at syrgja fyri, at landsstýrismenninir sita fyri sínum málsøkjum á fullgóðan og lógligan hátt, og tí rokna vit við, at hann fær skil á málinum, sigur Edmund Joensen.

Hann leggur tó dent á, at um løgmaður ikki syrgir fyri, at landsstýrismenn arbeiða lógliga, so er landsstýrismálanevndin til reiðar at kann eitthvørt mál av hesum slagnum.

# Bíðað meira enn eitt ár eftir eini avgerð



**Alistøðin Hólmalaks, sum heldur til á Gomlurætt, søkti fyri meira enn einum ári síðan um at sleppa at byggja út á økinum. Svarið frá myndugleikunum er enn ikki komið**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*

Ein umsókn frá eini alistøð um útbygging á ferjuleguøkinum á Gomlurætt hevur nú ligið í eitt á hjá ávikavist Landsverkfrøðinginum og Vinnumálastýrinum og bíðað eftir, at ein støða verður tikin, so alistøðin kann fáa svar.

Tað var tann 22. mai í fjør, at Hólmalaks søkti um at sleppa at gera ymsar útbyggingar á økinum, eins og biðið varð um, at ein bryggjukantur varð gjørdur fyri at lætta um fóðringina á støðini. Umsóknin varð tá send Kirkjubøar Kommunu, sum sendi hana víðari til Landsverkfrøðingin.

Talan er um landshavn á Gomlurætt, og hevur tí kommunan einki við økið at gera. Tí varð umsóknin send Landsverkfrøðinginum.

Men hóast Landsverkfrøðingurin í november í fjør boðaði Vinnumálastýrinum frá umsóknini frá Hólmalaksi og bað um eina prinsipavgerð, er enn einki hent, sigur Jens Reinert, stjóri á Holmalaksi. Og nú er leiðslan í Hólmalaksi farin at ótolnast og rykkir eftir svari.

Trupulleikin hjá Landsverkfrøðinginum er, at eisini annar fyrispurningur um brúk av økinum á Gomlurætt er komin til stovnin. Tað er Kirkjubøar Kommuna, sum biður um at sleppa at brúka part av havnarlagnum til bátahavn hjá fólki í kommununi. Landsverkfrøðingurin vil tí hava at vita frá Vinnumálastýrinum, hvat økið kann og skal brúkast til. Um tað bara skal vera ferjuhavn, ella um tað eisini skal brúkast til alivinnu og møgulig bátapláss.

Umsóknin hjá Hólmalaksi umfatar bygging av høll til fóðurgoymslu, eftirlitsstøð og gerð av 17 metrum av bryggjukanti. Eisini skal økið gyrðast inni og asfalterast. Við umsóknini er løgd útrokning frá verkfrøðingi, sum metir hesa útbygging at fara at kosta góða hálvatriðju millión krónur.

Jens Reinert, stjóri á Hólmalaksi, sigur, at rímiligt er einki avgjørt um, hvør skal gjalda útbyggingina, tá eingin avgerð er tikin, hvørt tað slepst at byggja út yvirhøvur.

Hann metir málið hava skund nú, tí ætlanin hjá felagnum er at økja tøkuna hálvatriðju ferð. Úr 600 tonsum árliga upp í 1.500 tons.

Men tað krevur millum annað ein bryggjukant, har fóðurbáturin kann leggja at. Sum er, er næsta atløgubryggja í Havn, og tað heldur hann vera rættiliga óhøgligt. Tað vil siga, at teir kundu sjálvandi flutt fóðrið við Teistanum til Skopunar og so heintað tað aftur haðani til aliringarnar á Gomlurætt. Og tað hevði verið verri enn at ført tað úr Havn, heldur hann.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, er burturstaddur, og teir, sum varða av málinum í Vinnumálastýrinum, vóru upptiknir, tá roynt var eftir viðmerking, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*– Tað kendist sum vanligt at verða á pallinum fríggjakvøldið. Eg hugsaði ikki so nógv um, at hetta var seinasta ferðin eg spældi við All That Rain, sigur Jens Marni Hansen*

# Jens Marni takkaði fyri seg

**Um vikuskiftið vóru seinastu framførslurnar við All That Rain, soleiðis sum fólk eru komin at kenna bólkin**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

All That Rain vóru um vikuskiftið í Klaksvík og spældu til dans. Fríggjakvøldið var stórur almennur dansur í KÍ-høllini, og leygarkvøldið spældi bólkurin í Klaksvíkar Klubba.

Hetta vóru seinastu framførslurnar við Jens Marna Hansen sum sangara og gittarspælara í bólkinum. Síðani All That Rain varð stovnað í kjalarvørrinum frá Kjølum, hevur Jens Marni verið frontmaður í bólkinum.

Hetta hevur hann ikki hug til longur, tí hann vil ikki brúka so nógva tíð til at spæla. Hetta hevur gjørt, at hann hevur sagt upp í All That Rain.

– Tað kendist sum vanligt at verða á pallinum fríggjakvøldið. Eg hugsaði ikki so nógv um, at hetta var seinasta ferðin eg spældi við All That Rain, sigur Jens Marni Hansen.

**Nýggj manning**

Teir báðir tónleikararnir, sum eru eftir í All That Rain, ætla at halda fram við bólkinum, men til tað krevst, at teir finna nýggjan sangara og gittarspælara.

Henning Nicodemussen og Jens Tummas Ness hava bjóðað øllum áhugaðum tónleikarum at gera vart við seg, um teir hava hug at spæla í bólkinum, og teir leita eisini sjálvur eftir nýggjum tónleikara ella tónleikarum.

450 fólk vóru til dansin í KÍ-høllini fríggjakvøldið, og tað er góð undirtøka, tá hugsað verður um líknandi tiltøk í Klaksvík.

# Maersk Air fingið nýggjan stjóra

**Nýggi stjórin í Maersk Air tók við starvinum 1. september. Hann kemur úr øðrum starvi hjá A.P. Møller**

STJÓRASKIFTI

Flemming Ipsen tók 1. september við sum nýggjur stjóri í Maersk Air eftir Ole Dietz.

Ole Dietz noyddist úr starvinum eftir málið um kartelavtaluna við SAS, sum var fyri fyrr í summar.

Flemming Ipsen flytir úr stjórastarvi hjá A.P. Møller í Singapore, har hann hevur starvast seinnu árini. Hann hevur annars verið í starvi hjá A.P. Møller síðan á nýggjárinum 1977.



Bjarne Hansen, fyrrverandi nevndarformaður í Maersk Air, fer í starvið, sum Flemming Ipsen sat í í Singapore.Hann noyddist eisini frá orsakað av kartelavtaluni við SAS.

**ej**